

# Sálarfrøðingur

Í sambandi við at sálarfrøðingur okkara fer í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir avloysara at byrja í starvi 1. apríl 2008 ella eftir avtalu. Talan er um eitt 6 mánaða farloyvisstarv, sum kann verða longt.

## Starvið

- Ráðgeving av starvsfólki á dagstovnaøkinum í mun til børn og ung
- Supervisión av starvsfólkabólkum og leiðarum
- Sálarfrøðilig kanning og eygleiðinging í mun til børn og ung
- Ráðgeving og supervisión av foreldrum í mun til børn og ung
- Fyribyrgjandi psykologiskt virksemi
- Kreppuhjálp

## Vit bjóða

- Eitt fjølbroytt og spennandi starv á virkisøki í stórari menning
- Ymiskar og skiftandi yrkisligar avbjóðingar
- Ávirkan á egið arbeiðsøki
- Supervisión og skeið
- Eitt gott tvøryrkisligt arbeiðsumhvørvi

## Vit vilja

Seta eitt fólk, ið hevur

- Útbúgving sum cand. psych. ella cand. pæd. psych.
- Áhuga í og royndir við smábarnaøkinum
- Hug og førleika at arbeiða konsultativt
- Góð samstarvsevni, er sinnað at hugsa nýtt og kann
- Arbeiða sjálvstøðugt

## Starvs- og setanarviðurskifti

Talan er um eitt fulltíðarstarv, sett og lønt sambært sáttmála millum fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya.

## Meiri fæst at vita

tá ið tú vendir tær til Birgit Debess, toymisleiðara ella Signhild Johannesen, sálarfrøðing, telefon 30 20 10 ella 21 42 12.

## Umsókn

Saman við upplýsingum um útbúgving og arbeiðsroyndir umframt viðmæli skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi týsdagin 25. mars 2008. Umsóknin verður send Postboks 32, 110 Tórshavn ella torshavn@torshavn.fo

*Aðalmálið hjá Barna- og ungdómsdeildini er at skapa umstøður fyri menning hjá børnum og ungum í Tórshavnar kommunu.*

*Á deildini starvast deildarleiðari, ein málsviðgeri og eitt ráðgevandi toymi við leiðara, trimum námsfrøðiligum ráðgevum og einum sálarfrøðingi.*

*Toymið samstarvar við dagrøkt, dagstovnar, frítíðarskúlar og ungdómshús í kommununi í mun til námsfrøðiligar og sálarfrøðiligar spurningar.*

*Við støði í einum konsultativum hugsunarhátti arbeiðir toymið við m.a. ráðgeving, vegleiðing, yrkisligari sparring og menningarprojektum í mun til børn á dagstovnaøkinum.*

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**

TAKS



# Frítíðarløn verður útgoldin 2. mai 2008

– ynskir tú at broyta kontonummar?

LES Á www.taks.fo